# Atlantisleiðarin heldur ikki fram

**Jógvan Eliasen, dagligur leiðari í mentunarhúsinum Atlantis hevur boðað frá, at hann ikki heldur fram í sínum starvi eftir 1. mei**

STARV
*Solby A. Eliasen*



*Jógvan Eliasen verður dagligur leiðari í Atlantis inntil 1. mei. Tá fer hann úr starvinum. Hvat síðani hendir, er ikki endalig støða tikin til enn*

**Klaksvík:** Í seinastu viku bórust tíðindini um, at Jógvan Eliasen, dagligur leiðari í Atlantis, ikki heldur fram aftan á 1. mei, tá hansara upprunaliga starvstíð er úti.

– Játtanin til húsið frá býráðnum er eftir mínum tykki alt ov lítil til at kunna reka húsið, sigur Jógvan Eliasen, sum heldur ikki er nøgdur við hølisviðurskiftini.

Men hann avsannar, at tað er nakað ilt komið í millum hann og stýrið.

– Vit eru samd um, at eg ikki skal halda fram eftir 1. mei, sigur Jógvan, sum sjálvur hevur sagt allatíðina, at hann ikki væntaði, at hann fór at verða gamal í starvinum.

Men hóast tað, so er hann sera harmur um, at húsið stendur, sum tað ger. Hann sigur, at tað eru sera avmarkaði møguleikar, tí hølisviðurskiftini eru sum tey eru. Og hann leggur afturat, at tað letur til at vera sera lítil hugur frá býráðsins síðu at játta pening til onkra átroðkandi íløgu. Til dømis nevnir Jógvan, at húsið sum so slettis ikki hevur atgongd til kjallaran, og tí hevur tørv á at fáa onnur høli. Her hevur hann hugsað um, at tað kundi verðið avbera gott at bygt loftið um, og harvið fingið meira pláss.

– Húsið kann ikki skaffa pening til vega, tá møguleikarnir eru so fáir, sigur Jógvan Eliasen, sum fer úr starvinum sum dagligur leiðari í Atlantis eftir 1. mei.

Nikolina Olsen, forkvinna í húsastýrinum, sigur, at tey hava havt fund um støðuna, men enn hava tey ikki tikið endaliga støðu til, um søkt verður eftir nýggjum leiðara beinanvegin.

– Vit fara at hava ein fund aftur í vikuni, og tá taka vit endaliga støðu til málið, sigur Nikolina Olsen í stuttari viðmerking.

# Fyrilestur um Tanzania

**Hóskvøldið 20. mars kl.19.30 heldur Elna Skylv Hansen almennan fyrilestur í býráðssalinum í Saltangará. Fyrilesturin hevur útgangsstøði í arbeiði við menning av skúlaverkinum í Tanzania**

TANZANIA
*Tíðindaskriv*

Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu hevur aftur tikið stig til eitt tiltak. Hesaferð er talan um ein fyrilestur, sum Elna Skylv Hansen fer at halda. Hon fer at greiða frá, tá hon í 1997, fór við Mellemfolkeligt Samvirke sum DW, Development Worker, til Tanzania at arbeiða við menningarhjálp. Hetta er í vanligari talu, tað, sum danir rópa »u-landsfrivillig«. Her starvaðist hon fram til 2000, sum ráðgevi á einari lærararamiðstøð fyri undirvísingaramboð.

Í arbeiðinum í Tanzania byrjaði Elna, saman við hinum útsendu, at kalla frá grundini. Tey vóru runt og vitjaðu skúlar, og prátaðu við lærarar um hetta nýggja konseptið, sum tey kallaðu TRC, Teachers´ Resource Centre. Í arbeiðinum høvdu tey skeiðvirksemi, og eisini stovnaðu tey eitt bókasavn. Sum fráleið tóku fleiri og fleiri undir við teirra ætlanum. Hetta førdi m.a. við sær, at fleiri lærarar fóru aftur á skúlabonk, fyri at betra um sítt fakliga støði. Tá Elna fór heimaftur til Føroya vóru tey júst flutt í nýggjan góðan bygning við 2 skúlastovum, bókasavni, skrivstovu, goymslu og køki. Elna sigur at hetta var ein spennandi og lærurík tíð har vinnast skuldi á nógvum forðingum, stórum sum smáum.

Fyrilesturin er almennur og kostnaðurin er kr. 50



*Elna Skylv Hansen fer at greiða frá, tá hon í 1997 fór við Mellemfolkeligt Samvirke sum DW, Development Worker, til Tanzania at arbeiða við menningarhjálp*



*Elna sigur at hetta var ein spennandi og lærurík tíð har vinnast skuldi á nógvum forðingum, stórum sum smáum*



Haldið Sosialin!
400,- kr. um ársfjórðingin
- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu
600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)
Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.
Ókeypis
Verður sent óposteð
Sosialurin rindar postgjaldið
64
Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:
Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Sosialurin